

## Einki svar

Aftur í morgun kom ólag á í Løgtinginum, tá ið landsstýrisfólk skuldu svara spurningum frá løgtingslimum. Fyri jól átalaði løgtingsformaðurin harðliga, at landssýrisfólk ikki vóru møtt í Løgtinginum á einum fundi, tá ið spurningar vóru á skránni. Aftur í morgun vóru ófráboðaðir spurningar á skránni, men aftur hesuferð knípti tað hjá landsstýrisfólkum at møta upp. Johan Dahl og Jóannes Eidesgaard høvdu boðað formansskapinum frá, at teimum barst frá at møta og Rósa Samuelsen hevði boðað frá, at hon stóð føst í ferðsluni og varð ov sein. Á løgtingsfundinum í morgun var ein tími settur av til spurningar frá løgtingslimum til landsstýrisfólk. Hesuferð fekk sjálvstýrisflokkurin fyrsta spurningin og hetta høvi brúkti Kári P. Højgaard til at spyrja Aksel V. Johannesen um heilsutrygd og ognirnar hjá sjúkrakassanum. Men tað nyttaði lítið, tí tí eisini landsstýrismaðurin í heilsumálum varð ov seinur á Løgtingsfundin og sostatt fekk løgtingsmaðurin onki svar. Hetta átalaði Kári P. Højgaard, tí hann helt, at landsstýrisfólk skuldi hava skyldu at møta, tá ið spurningar vóru á skránni. Seinast ófráboðaðir spurningar vóru á skránni, var tíðin farin, áðrenn Sjálvstýrisflokkurin slapp framat, so heldur ikki tá fekk hann høvi at seta ein spurning, hann hevði ætlað sær

# Spurningurin um hýsu ikki so einfaldur

**- Tilsamans 5.000 tons av hýsu vórðu veidd undir Føroyum í fjør, og tá feskfiskaútflytararnir hava fingið sítt, er lítið eftir til virkingar á landi. Hetta er ein lutfalsliga lítil nøgd at byggja nakra framleiðslu og leverandu á, sigur formaðurin í Føroya Ráfiskakeyparafelag, Símun P. Jacobsen**



*Formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum heldur ikki, at prísirnir á hýsu á fiskamarknaðinum í Føroyum hava verið so lágir, sum onkur vil vera við*

HÝSA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Formaðurin í Føroya Ráfiskakeyparafelag heldur ikki, at spurningurin um hýsu, sum bretskar handilsketur boykotta, er heilt so einfaldur, sum hann verður gjørdur til.

- Tað er ikki rætt, at vit slett ikki kunnu selja virkaða hýsu í Bretlandi, men tað er rætt, at føroyskir framleiðarar hava havt trupulleikar við hýsuni. Tað er eisini rætt, at bretskar handilsketur ikki so fegnar vilja hava virkaða hýsu undan Føroyum í sínum vøruútboði, tí tær vilja ikki koma í ringt ljós millum síni viðskiftafólk.

Símun P. Jacobsen vísir á, at tá almennu hagtølini vísa, hvussu lítil hýsuveiðan var undir Føroyum í fjør, siga hesi ráðgevum hjá handilsketunum, at hýsustovnurin er illa fyri.

- Hetta hevur havt sína ávirkan á teirra hugburð móti virkaðari hýsu undan Føroyum.

### Smáar nøgdir

Formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum vísir á, at ein annar stórur trupulleiki við hýsuni er, at nøgdirnar eru so smáar, at tað ber illa til hjá nøkrum framleiðara at leggja seg eftir virkaðum hýsuvørum.

- Stórir keyparar kunnu soleiðis heldur ikki vænta, at teir kunnu fáa eina støðuga levering úr Føroyum, leggur hann aftrat.

Símun P. Jacobsen tekur ikki dagar ímillum, hvat er rætt, og hvat er skeivt – at selja óvirkaða hýsu í mun til virkaða hýsu, tí hetta er ikki hansara uppgáva sum formaður í Ráfiskakeyparafelagnum.

- Viðhvørt eru prísirnir so góðir á feskum heilum fiski, at framleiðsluvinnan megnar ikki kappingina, og hetta kann snúgva seg um ymisk fiskasløg – og ikki bara hýsu.

Hann heldur, at tað er gott fyri dynamikkin í eini vinnu, at keyparar eru, sum kunnu selja fiskin heilan av landinum, eins og keyparar eru, sum vilja virka fiskin til útflutnings.

- Tosa vit um arbeiðsskapandi virksemi, leggur framleiðsla av okkara tilfeingi sjálvandi meiri eftir seg enn útflutningur av feskum heilum fiski.

### Ikki grenja

Símun P. Jacobsen er ikki so samdur í, at prísirnir á hýsu, sum er veidd undir Føroyum, eru ov lágir.

- Tá fiskimenn og reiðarar selja hýsu fyri rímiliga góðan prís til útflutnings á bretska feskfiskamarknaðin, mugu teir eisini rokna við, at prísirnir onkuntíð kava. Feskfiskamarknaðurin hongur neyvt saman við útboði og eftirspurningi, og tí verður ofta talan um yoyo-prísir á hesum marknaði.

Hann vísir á, at prísirnir á føroyskari hýsu á føroyska marknaðinum generelt hava verið hægri enn prísirnir, sum eitt nú íslendingar og norðmenn hava fingið fyri sína hýsu.

- At so onkur skip gera góðar feskfiskasølur í Bretlandi, er nakað, sum altíð hevur verið. Soleiðis er tað bara, tá tú selir feskan fisk á marknaðinum. Tað kann ganga væl, og tað kann ganga minni væl, leggur Símun P. Jacobsen aftrat.

Formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum heldur, at tað kanska hevði verið eitt hugskot, um okkurt virki hevði gjørt avtalu við línuskip um leveransu av hýsu.

- Tá kundi tú gjørt eina roynd at bygd upp eina framleiðslu og soleiðis eisini ein marknað í útlandinum fyri hesi vøru, sigur Símun P. Jacobsen.



*- At føroysk hýsuframleiðsla verður boykottað á bretska marknaðinum, er ikki allur sannleikin, sigur Símun P. Jacobsen*